KRINGVARP FØROYA

**Fótbóltssamband Føroya**
**Gundadalur**
**Postrúm 3028**
**FO-110 Tórshavn**

Tórshavn 8. September 2025

**<u>Viðvíkjandi sendingini "Fótbóltsprát", send mánadagin 1 september</u>**

Sum ávikavist Kringvarpsstjóri við endaligu programmábyrgdini fyri sendingarnar í Kringvarpi Føroya og Tíðindaleiðari við ábyrgd fyri sendingini Fótbóltsprát hava undirritaðu gjøgnumgingið sendingina, ið varð send í útvarpinum mánadagin 1. september 2025.

Okkara niðurstøða eftir hesa gjøgnumgongd er, at sendingin í fleiri førum ikki er í tráð við fjølmiðlaetisku leiðreglurnar og journalistisku stevnuna hjá KvF.

Sendingin viðger nýsetta tekniska leiðaran í FSF, og vertur og viðmerkjarar meta um hansara persón, eitt nú við at siga at "kanska er hann fittur, men konfliktsky, hoyri eg." KvF viðger vanliga ikki setanir og fólk, ið verða sett í starv, á hendan hátt, og meta vit, at hetta er at fara út um tað, ein kann loyva sær at gera av persónligum metingum um eitt nýsett starvsfólk.

Fjølmiðlaetisku leiðreglurnar siga at:

*Tað er góður fjølmiðlasiður at sýna virðing fyri serkennum, samleika, privatlívi, uppruna, tjóðskapi og lívsáskoðan. Tað er ikki góður fjølmiðlasiður at taka fram persónlig og privat viðurskifti, um tey ikki eru avgerandi neyðug fyri at lýsa málið.*

Og at:

*Eingin ivi skal vera um, hvat eru ítøkiligar upplýsingar og hvat eru viðmerkingar*

Í hesum førinum kundi ivi vera hjá lurtaranum um, hvat er ítøkiligt og hvat er persónliga meiningin hjá verti og viðmerkjarum, og persónligir eginleikar drignir fram, uttan at tað stóð greitt, hví hetta hevði týdning fyri sendingina.

Vertur og viðmerkjari gera sínar metingar út frá ónevndum og leystliga eyðmerktum keldum, og út frá tí viðmerkjararnir, sum teir siga "hoyra frá fleiri" og "hava sneytað seg fram til." Kringvarpið arbeiðir stundum við ónevndum ella dulnevndum keldum, men sambært fjølmiðlaetisku leiðreglunum, eiga heimildir at verða upplýstar, uttan so at fyrilit krevja, at tær eru duldar. Tað kom ikki greitt fram, hví keldurnar hjá verti og viðmerkjara vóru duldar.

Heldur ikki var greitt, um samsvar var við okkara arbeiðshátt og journalistisku stevnu, sum m.a. sigur, at "grundleggjandi upplýsingar altíð eru væl kannaðir og eftirfarandi."

Í sendingini varð ikki tosað við viðgjørda persónin ella leiðsluna fyri felagsskapin, har hann starvast. Sendingin livir sostatt ikki upp til kravið í fjølmiðlaetisku leiðreglunum og okkara journalistisku stevnu, sum áleggur okkum at hoyra allar partar. Var evnið eitt annað enn fótbóltur, hevði tað neyvan komið fyri, at ein starvssetan og ein persónur vórðu viðgjørd uttan at hvørki arbeiðsgevari ella tann setti fingu høvi at svara fyri seg.

Fjølmiðlaetisku leiðreglurnar siga at:

*4.14 Tey, ið standa fyri skotum, eiga skjótast til ber at sleppa at svara, um ikki álop og atfinningar eru partur av einum framhaldandi orðaskifti. Svarið eigur at vera hóskandi í vavi, hava eitt sømiligt snið og snúgva seg um viðkomandi mál. Umbøn um at sleppa at svara aftur kann sýtast parti í máli, um hann upprunaliga uttan sakliga grund hevur borið seg undan at svara samstundis í sama máli.*

Vitg skulu tí geva FSF og Jonas Nielsen, tekniska leiðaranum hjá FSF, eina umbering fyri innihaldið í sendingini Fótbóltsprát 1 september, og fyri, at FSF og Jonas Nielsen ikki fingu høvi at svara fyri seg.

Harumframt skulu vit upplýsa, at stig verða tikin til at tryggja, at sendingin í framtíðini lýkur krøvini í fjølmiðlaetisku leiðreglunum og stevnuni hjá KvF.

Umrødda sending er løgd á heimasíðu okkara kvf.fo, og verður sendingin har klipt umaftur, so viðgerðin av persónligu eginleikunum hjá Jonasi Nielsen verður tikin úr. Eisini verður gjørt greitt á sendingasíðuni, at sendingin ikki livir upp til krøvini um, at allir partar verða hoyrdir.

Vinarliga

Magnus Dam — Kringvarpsstjóri

Katrin Petersen — Leiðari fyri Aktuelt-deildina hjá Kringvarpi Føroya